Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um at seta radara upp í Føroyum, settur løgmanni, Bárði á Steig Nielsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Nær fingu løgmaður og landsstýrið kunning um ætlanirnar og semjuna um at seta radara upp í Føroyum?

2. Frá hvørjum kom henda kunningin?

3. Hvat svaraðu løgmaður og/ella landsstýrið til hesa kunning?

Viðmerkingar:

10. februar 2021 fingu løgtingslimir og Føroya fólk kunning gjøgnum danskar miðlar um semjuna í danska Fólkatinginum at seta pening av til radara í Føroyum. Føroyingar fáa tó ikki neyvari kunning, fyrr enn danski verjumálaráðharrin hevur tíðindafund, skilst. Tí hesin fyrispurningur til løgmann.

Á Løgtingi, 11. februar 2021

Beinta Løwe Jacobsen